# H-bandin lúrir eftir IM-normi

**Heini, Hans Kristian og Helgi skulu næstu dagarnar royna at vinna sær næsta IM-normin. Allir hava ein IM-norm liggjandi í skuffuni, og teir halda, at møguleikin er at vinna tann næsta í Klaksvík International talvkappingini**

TALVKAPPING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*22 ára gamli Hans Kristian Simonsen og 15 ára gamli Helgi Dam Ziska eru saman við tí nakað eldri Heina Olsen við í talvkappingini í Klaksvík. Allir tríggir hava ein IM-norm og stríðast fyri at fáa tann næsta*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Heini Olsen, Hans Kristian Simonsen og Helgi Dam Ziska eru føroysku luttakararnir í Klaksvík International 2005, sum verður hildin næstu dagarnar.

Onkur er farin at kalla teir H-bandan, og føroyska trioini ætlar sær eisini at liggja og lúra eftir einum IM-normi.

– Eg haldi, at møguleikin er góður fyri at fáa ein IM-norm. Eg stíli eftir at vinna kappingina, og skal eg gera tað, so má eg vinna tey flestu talvini, sigur ein bragdligur Hans Kristian Simonsen.

### Tann yngsti vil eisini

15 ára gamli Helgi Dam Ziska er av álvara á veg fram í føroyskari telving, og hann hevur longu vunnið sær ein IM-norm í kapping í Danmark. Nú fær hann ein møguleika í altjóða kappingini í Klaksvík.

– Hetta er sterkasta kappingin, sum eg havi verið við í, um tú hugsar um miðalstyrkistalið hjá telvaranum, men eg fari at royna at enda í betru helvtini, sigur Helgi.

*Hvussu heldur tú møguleikin er fyri at vinna næsta IM-normin í hesari kappingini?*

– Møguleikin er til staðar, men hetta er ein sterk kapping, og eg veit ikki rættiliga, hvussu formurin hjá mær í løtuni. Eg fari at gera mítt besta.

# Streymprísurin meira at siga fyri vinnuna á landi

**– Streymprísurin er meira avgerandi fyri vinnuna á landi, enn oljuprísurin er, men verður oljuprísurin verðandi høgur, fer tað at merkjast, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum**

OLJUPRÍSIR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Í fyrstu atløgu kann høgi oljuprísurin merkja ein hægri kostnað fyri eitt nú flutning á landi, sjógvi og í luftini, men tað fer at merkjast enn meira hjá vinnuni á landi, um oljuprísurin hevur við sær, at streymprísurin hækkar, sigur jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum*

Vinnan á landi brúkar meira streym enn olju, og tí hugsa flakavirki, handlar og onnur meira um, hvat streymprísurin, enn hvat oljuprísurin er.

– Tað mekist sjálvandi í ávísan mun, at oljuprísurin er høgur, men tað hevur størri týdning fyri stóru flakavirkini og onnur, hvat streymprísurin er, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

– Í fyrstu atløgu kann høgi oljuprísurin merkja ein hægri kostnað fyri eitt nú flutning á landi, sjógvi og í luftini, men tað fer at merkjast enn meira, um oljuprísurin hevur við sær, at streymprísurin hækkar í næstum, sigur hann.

### SEV undir trýsti

Vinnan á sjónum hevur stórar trupulleikar av høga oljuprísinum, og summi reiðarí umhugsa, um tað loysir seg at fara til fiskiskap alt árið runt.

Eisini størsti brúkarin av olju í landinum, SEV, svíður fyri høga prísin, og Klæmint Weihe, stjóri hjá SEV, segði við Sosialin í gjár, at tað er ikki ósannlíkt, at streymprísurin hækkar í næstum.

– Eg kann einki ítøkiligt siga um, hvussu tað verður við el-prísinum næsta ár, men vit mugu taka hædd fyri oljuprísinum, tá ið vit leggja fíggjarætlanina fyri næsta ár, sigur Klæmint Weihe.

Endaliga avgerðin um streymprísin fyri næsta ár verður tikin á umboðsráðsfundi hjá SEV 18. november.

# Einahandilin hýsir altjóða talvkapping

**Tríggir føroyskir telvarar kappast við tríggjar sterkar útlendingar í altjóða talvkapping, sum verður hildin í gomlu handilshúsunum úti í Klaksvík. Føroyingar stíla eftir IM-normi, men teir vita, at kappingin verður hørð**

TALVKAPPING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fríggjadagin byrjaði Klaksvík International talvkappingin, og hesaferð eru tríggir føroyskir telvarar og tríggir norðurlendingar við í kappingini.

Sum nakað nýtt verður talvkappingin hildin í Leikalund, sum heldur til í gomlu handilshúsunum úti í Klaksvík. Umhvørvið er heilt serstakt, men tað er eisini hugnaligt og væl egnað til talvkappingar.

– Hetta eru sera hugnalig høli at telva í, og hetta er eitt sindur øðrvísi enn tað, sum vit eru vanir við, sigur Jens Ove Friis Nielsen, sum í ár skal verja heitið, sum hann vann sær í kappingini í fjør.

– Húsini liggur mitt í býnum, og bilar koyra fram við, men tað fer ikki at órógva okkum. Tá ið vit sita frammanfyri talvborðinum, so er tað talvið, sum vit hugsa um, og so kundu vit í grundini næstan verið á mánanum, sigur hann.

### Sterk mótstøða

Umframt danska altjóða meistaran verða eisini tveir aðrir sterkir norðurlendskir telvarar við í kappingini. Johan Eriksson úr Svøríki, sum vann kappingina fyrraárið, er við aftur í ár, og norðmaðurin Eirik Gullaksen er somuleiðis komin til Klaksvíkar at telva.

Felags fyri teir tríggjar útlendsku telvararnar er, at teir eru allir altjóða meistarar, og tað ikki bara styrkir kappingina í Klaksvík, tað gevur eisini føroyingunum møguleikan at vinna sær IM-norm.

– Hetta er ein góð og sterk kapping, har føroyingarnir hava kjansin at vinna sær IM-norm, men teir vita, at teir skulu framvíð teimum útlendsku telvarunum, og teir eru ikki lættir at syfta, sigur Rani Nolsøe, sum skipar fyri kappingini.

### Varðar eina viku

Telvað verður allar dagarnar fram til næsta leygardag, og tað verður telvað allar dagar kl. 14.00. Í dag eru tó tvey talv á skránni.

Fólk kunnu støkka inn á gólvið í Leikalund at fylgja kappingini, men tað ber eisini til at fylgja við á netinum. Á heimasíðuni hjá talvsambandinum er live-dekningur av Klaksvík International 2005.

– Í grundini eru teir flestu áskoðararnir als ikki til staðar í Klaksvík, men vit hava fleiri hundrað fólk, sum fylgja við á netinum, sigur Rani Nolsøe.



*Jens Ove Friis Nielsen var altjóða talvkappingina í Klaksvík í fjør, og fyrraárið var tað sviin Johan Eriksson. Teir eru báðir viðaftur í ár*

*Mynd: Bárður Lydersen*